## Oddagrein

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo



# KLÍPA HELDUR ENN REFORMERA

Ábendingar hava seinastu tíðina verið um, at búskaparstøðan er blivin betri. Skattainntøkurnar hjá bæði landinum og kommununum vuksu fyrstu seks mánaðirnar í ár, fulltíðararbeiðsloysið minkaði í juni, og bæði fólk og vinna hava størri tiltrúgv til búskapin.

Fíggjarmálaráðið gjørdi fyri kortum eina nýggja konjunkturkanning, har vinna og fólk vórðu spurd um, hvussu tey meta um útlitini í búskapinum. Fyri fyrstu ferð í tvey ár var tað sonevnda treystitalið positivt, og tað sigur frá, at fólk og vinna eru meira positiv um útlitini í búskapinum. Álitið hjá fólki og vinnu á búskapin er avgjørt ein viðvirkandi orsøk til, at tað kann ganga betur, men í grundini er konjunkturkanningin ein staðfesting av, hvussu mótið er millum fólk og vinnu júst nú – og ikki ein analysa av búskapinum og útlitunum sum so.

Samstundis sum summir pílar í hesum døgum peika rætta vegin í føroyska samfelagnum, sita fólk í aðalráðunum og stríðast við sveittabroti fyri at fáa játtanina til næsta ár at ganga upp. Vøksturin í almennu útreiðslunum skal tálmast, og nú tað verður gjørt, skulu skerjingar gerast nógvastaðni. Fyrstu ætlaninar hava sæð dagsins ljós, og fleiri eru á veg. Avleiðingin av hesum er, at teir pílar, sum í løtuni peika varisliga uppeftir, kunnu skjótt fara at peika niðureftir aftur, tá ið almennu sparingarnar verða gjørdar á fíggjarlógini næsta ár. Og eisini almennar sparingar í londunum rundan um okkum kunnu ávirka okkara búskap skeiva vegin komandi tíðina.

Sagt verður, at góður búskaparpolitikkur er at brúka pengar í ringum tíðum fyri at hava hjólini malandi og at halda aftur í góðum tíðum fyri at minka um ferðina. Í Føroyum hava politikararnir nøkunlunda funnið út av at brúka pengar í ringum tíðum, men tað almenna hevur eisini gingið á odda í at brúka pengar í góðum tíðum, og sveiggini í búskapinum hava tí



verið hareftir.

Og samstundis sum politikararnir nú skulu sita og klípa av her og har – hjá teimum veiku, hjá teimum gomlu, hjá familjunum og øllum hinum – liggja reformar og veruligar rationaliseringar, sum av álvara kundu flutt nakað og bíða eftir semjum, avgerðum og íverksetan. Kommunureformur, skúlareformur, heilsureformur og fiskivinnureformur. Vit hava hoyrt um teir og arbeitt verður við onkrum, men alt ov lítið sæst av ítøkiligum úrslitum, sum veruliga kundu flutt samfelagið og bøtt um búskaparstøðuna.

**Ov lítið sæst av ítøkiligum úrslitum, sum veruliga kundu flutt samfelagið**

# The Dreams trívist á MTV hitlista

Millum nøvn sum AC/DC, Bloodhound Gang, Editors, Green Day, Metallica, Muse og Rammstein, er The Dreams eisini á Rockzone-listanum hjá MTV í Týsklandi.

Sangurin 'Revolt' er somikið væl umtóktur, at hann hevur verið á listanum í gott og væl ein mánað. Fyri at verða á Rockzone listanum krevst, at fólk atkvøða fyri sanginum.

Komandi framførslan, sum The Dreams spælir, er á Summarfestivalinum í Klaksvík.

*uni@sosialurin.fo*





**Stríðið heldur fram**

PAUL WATSON
SÍÐA 4



**Nú eri eg ein blaðungur oldingi**

STEINTÓR RASMUSSEN
SUMMAR S 4-5



*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

# Løgmaður skrivar í Fámjin

Seinastu dagarnar hevur Kaj Leo Johannesen verið í Suðuroy, har hann hevur roynt at hildið frí í nakrar dagar. Men hann hevur eisini verið noyddur at hugsa um ólavsøkurøðuna, sum hann skal halda í løgtingum ólavsøkudag. Hendan røðan verður fyrireikað í góðari tíð, men seinasta hond verður ikki løgd á røðuna fyrr enn stutt fyri ólavsøku. Og hesar dagarnar í Fámjin hevur Kaj Leo Johannesen eisini tikist við ólvsøkurøðuna hjá sær og hevur skrivað onkrar partar av henni.

– Optimisman, sum hevur verið, sæst nú aftur í tølunum, og tað er munandi lættari at halda ólavsøkurøðuna í ár, enn tað var í fjør. Tá peikaði alt niður eftir, bæði hjá okkum og londunum rundan um okkum, men nú er vend komin í, og vit eru á veg uppaftur, heldur Kaj Leo Johannesen.

## Sirkus verður ongantíð hitt sama aftur

Í Føroyum finst serføroyskt fyribrigdi, tá ið talan er um lýsingar. Vit hava øll hoyrt sagt í útvarpinum, at: "Gott bingo verður í kvøld, nógvir góðir vinningar." Eisini hava vit hoyrt, at: "Góður dansur verður í kvøld. NN spælir."

Leygarkvøldið 24. juli klokkan 20:00 verður góður upplestur í Sirkusi við ótrúliga góðum upplestri úr 2/3 av kongaríkinum.

Úr Danmørk fara danmarksmeistarin í poetry slam, Lasse Thorning, og danmarksmeistarin og europameistarin í poetry slam, Thorkil Jacobsen, at lesa upp.

Úr Føroyum fara ungu yrkjararnir Ludvík Breckmann, Sissal Kampmann og góði, gamli Carl Jóhan Jensen at lesa egnar yrkingar.

Hetta verður eitt megnargott kvøld, har ógvuliga góður skaldskapur fer at fylla hvørja sprungu, sum fer at fáa luftina at darra við løddum orðum, ið fara at fúka sum byrsukúlur. Sirkus verður ongantíð hitt sama aftur.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*